# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Berit Joensen

Tey gomlu skulu fara, tey ungu kunnu fara. Hetta mugu vit ásanna, nú vit skriva minningarorð um fyrrverandi starvsfelaga okkara Berit, ið andaðist bert 53 ára gomul.

Hóast vit vistu hvønn vegin tað bar, koma deyðsboð altíð óvart á okkum. Alt stegðar upp og vit hugsað - hví júst hon, í besta aldri.

Vit minnast við takksemi aftur á tíðina, vit høvdu saman við Berit. Røsk álítandi var hon í sínum arbeiði og helt seg ikki aftur at geva eina hjálpandi hond har ástóð. Lagið var altíð gott. Mangan verður sagt, "tað er ikki, sum tá Berit var her", har hon var, var lív í, og ikki smæddist hon burtur, tá okkurt stuttligt var á skránni. Hon var lítilátin, men var ikki bangin fyri at siga sína meining.

Hon var altíð klár, tá okkurt skuldi fyriskipast, um tað var til jólafrokost ella yvirnátting í Botni, hon var altíð við. Hennara smittandi látur var við til at gera løturnar hugnaligar og minniligar.

Hóast tað er við sorgblídni vit skriva hesar reglur, vita vit, at Berit er komin til ein betri stað, har sorg og pína ikki finst, og vit øll skulu møtast har aftur ein dag.

Góða Marit, Poul, Ingi, Erling, Johild og syskin v/fam. Mangan verður sagt, at størri byrðar verða ikki lagdar á herar okkara, enn vit megnað at bera. Má Harrin geva tykkum styrki og troyst at koma víðari í hesi sváru tíð.

Við hesum fáu orðum lýsa vit frið yvir minninum um Berit.

**Starvsfólkið í køkinum og portørarnir á Suðuroyar sjúkrahúsi**



## †

### Andlát og jarðarferðir

**Borghild Lindberg úr Havn**, ættað av Tungu í Haldarsvík, andaðist mánakvøldið á ellisheiminum í Havn, 95 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vestur kirkjuni fríggjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Borghild kunnu lata Meinigheitshúsinum í Havn eina peningagávu. Konta í EIK.

**Dagurin**
**6. desember. Nikolaus,** deyður umleið ár 350. Hann var biskupur í Myra, sum er í Lítlaasiu. Hann varð tikin av døgum sum pínsluváttur, men við grøv hansara í Myra hendu so mong undurverkini, at hann skjótt varð roknaður sum halgimenni. Niklasar- ella niklasmessa hevur verið hildin í Føroyum. Og ein gomul føroysk vísa er um Niklas, har niðurlagið er: Hjálpi mær Guð og ríki harrin, Sankta Niklas

Edith Mørkøre, listakvinna:

## Listaframsýning í Gallarí Jinx



Í allan desember mánað hevur Edith Mørkøre listaframsýning í Gallarí Jinx á Áarvegnum í Havn.

Evnini, sum hon hevur mála út frá, eru viðurskifti, sum rørast í tí dagliga lívinum, og tíðini vit liva í í dag.

Fyri at nevna nøkur av heitunum á málningunum sum eru við á framsýningini, so er tað heiti sum: Samanhald, Umsorgan, Umsorgan svíkur, Hugarensl, Ferðin, Lívsløta o.s.fr. Hetta eru alt evnir sum liggja tætt upp at lívinum hjá øllum fólkum á einum ella annan hátt.

Edith er fødd í Tórshavn í 1979, uppvaksin á Argjum og er búsitandi í Hoyvík. Hon hevur frá ungum árum havt áhuga fyri at skapa, tekna og mála, og hevur hon støðugt ment seg. Hon hevur gingið á Háskúla í Rønde har hon hevði sergrein í list. Edith málar á atelierinum á Argjum.

Hon hevur verið við á nógvum ymiskum framsýningum kring landið. Hon hevur millum annað sýnt fram í Smiðjuni í Lítluvík, Ribarhús, Lions Runavík, Lions Tórshavn, Norðoyast evnuframsýningini, Hafnia, Kelduni, Gallarí Jinx, Snarskivuni, Eik, á torginum í SMS, Gallarí Oyggini og Gamla handlinum í Heiðinum.

Komandi ár fer Edith út um landoddarnar við listini, og í apríl skal hon hava eina sjálvstøðuga framsýning í Københavns Kulturcenter.

Í ár hevur Edith eisini framleitt 16 ymisk kort. Kortini eru av myndum av figurum hon hevur tilevnað úr saltdeiggji. Vit fara at síggja meira til hetta í bløðunum og í handlunum kring landið komandi tíðina.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin